# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Okkara kanningar vísa, at flogfarið, sum fór av breytini í Sao Paulo, hevði alt ov nógva ferð*

*(brasilska flogvápnið)*

# Tað var sum 11. september

**Fólk gjørdust púra frá sær sjálvum, tá eitt hitarør í New York-býlinginum Manhattan brast í gjár**



*Rokið av vatni og eimi minti ikki sørt um dustið og roykin 11. september í 2001*

Øll hugsaðu um 11. september, og tað var heldur ikki so løgið, tí gøtumyndin á Manhattan minti nógv um tað, sum hendi í New York fyri skjótt seks árum síðani. Men borgarstjórin var skjótur at sissa býarfólkið.

- Hetta var ikki annað enn eitt brek við okkara vatnveiting, segði Michael Bloomberg, eftir at myndugleikarnir høvdu fingið vissu fyri, at talan var um eitt brostið vatnrør og ikki yvirgang.

Rørið við tí heita vatninum brast undir einari av gøtunum á Manhattan, og trýstið var so stórt, at vatn og eimur stóðu upp um Chrysler-bygningin, sum er í 77 hæddum. Vatnið og eimurin mintu ikki sørt um dustið og roykin 11. september í 2001.

Býarmyndugleikarnir siga, at rørið var frá 1924, og heilsumyndugleikarnir bera nú ótta fyri, at bresturin kann hava slongt nógv asbest upp í loft.

# Hevði alt ov nógva ferð

**Sjónbandsupptøkur vísa, at Airbus-flogfarið, sum fór av flogbreytini í Sao Paulo, hevði alt ov nógva ferð**

Flogvøllurin í Sao Paulo hevur leingi verið fyri atfinningum, tí flogskiparar og onnur halda ikki, at hann er nóg tryggur, og tey atfinningarsomu halda seg hava fingið nóg góð prógv eftir vanlukkuna fyrrakvøldið, sum kostaði umleið 200 mannalív.

Men sjónbandsupptøkur á Congonhas-flogvøllinum, sum brasilska sjónvarpið hevur fingið hendur á, vísa, at Airbus 320-flogfarið hevði nógv meiri ferð, enn flogfør eiga at hava, tá tey seta seg á vøllin. Upptøkurnar vísa vanlukkuflogfarið og eitt annað flogfar, sum setti seg stutt frammanundan. Tað fyrra flogfarið brúkti 11 sekund til ein ávísan tein á lendingarbreytini, men vanlukkuflogfarið brúkti bara trý sekund til sama tein.

Brasilsku loftferðslumyndugleikarnir vildu ikki gera nakrar viðmerkingar í dag til tíðindini hjá sjónvarpinum.

# Aftur deyðarevsing í Florida

**Eftir steðg í sjey mánaðir setir Florida aftur deyðarevsing í gildi**

Fyri sjey mánaðum síðani gjørdi táverandi guvernørurin í Florida, Jeb Bush, av at seta deyðarevsingina úrt gildi. Orsøkin var ein miseydnað avrætting, har tað tók 34 minuttir at fáa lívið av einum fanga, sum bleiv avrættaður við eiturinnspræning. Tað vísti seg, at sproytan hevði ikki rakt tað rætta staðið, og tí mátti hon fyllast aftur og maðurin sproytast eina ferð afturat.

Tilburðurin vakti stóran ans, og endin varð, at Jeb Bush, sum er bróðir amerikanska forsetan, gjørdi av at seta deyðarevsingina út gildi.

Men nú hevur eftirmaður hansara, Charlie Crist, gjørt av at taka deyðarevsingina uppaftur. Hann hevur góðtikið, at ein maður, sum varð dømdur til deyða fyri burturflyting, neyðtøku og morð í 1992, skal takast av døgum í fongslinum.

## STUTT SAGT

### Burtur-fluttir

Týsk bløð skrivaí dag, at Taleban hevur burturflutt tveir týskar ríkisborgarar og fimm afghanar í Ghasni. landslutinum einar 100 kilometrar sunnan fyri afghanska høvuðsstaðin Kabul. Ein talsmaður hjá Taleban segði seinni, at hann visti einki um burturflytingarnar, men týsku myndugleikarnir váttaðu í dag, at tveir týskir ríkisbgorgarar eru horvnir í Afghanistan. Guvernørurin í Ghasni sigur við BBC, at sambært teimum seinastu upplýsingunum hava burturflytararnir flutt teir sjey menninar til landslutin Wadak.

### Kanna veðrið

Teir næstu 14 dagarnar fara nakrir limir í Umboðsmannatinginum og Senatinum í USA til Ilulissat í Grønlandi at kanna, hvussu veðurlagsbroytingarnar hava ávirkað viðurskiftini har. Tað fyrsta amerikanska ferðalagið kemur til Grønlands í morgin, og eitt annað kemur tann 27. juli, sigur útvarpið í Nuuk. Formaðurin í amerikanska Umboðsmannatinginum, Nancy Pelosi, var í Ilulissat fyri tveimum mánaðum síðani, og tað er hon, sum hevur fingið ferðirnar í lag.

### Størri hegling

Fyrradagin fingu fleiri bilar í Danmark buglur av sjáldsama stórum heglingi, men nú siga donsku veðurmenninir, at danir kunnu vænta sær meiri av stórum heglingi í komandi árum. DMI sigur, at danir kunnu vænta meiri toruslátturog fleiri skýpumpur í framtíðini.